# Útbjóðing av Power BI heildarloysn til Gjaldstovuna

# Indhold

0. Endamál ........................................ 3
1. Inngangur ........................................ 3
1.1 Uppgávan ........................................ 3
2. Grundarlag ........................................ 4
4. Tilgongd ........................................ 5
6. Kostnaður og tíðarætlan ........................................ 7
7. Meting av tilboðum ........................................ 7
8. Tilboð ........................................ 8
9. Dómsnevndin ........................................ 8
10. Viðgerð av innkomnum tilboðum ........................................ 8
11. Hentir upplýsingar ........................................ 9

# 0. Endamál

Gjaldstovan hevur sum mál at fáa til vega eina heildarloysn fyri hagtøl.

Í dag arbeiða deildir og eindir við ymsum amboðum og leistum, og viðurskiftini eru sum heild ikki samskipaði ella sentraliseraði. Hetta er ikki skynsamt og hevur við sær, at vit ikki fáa tað samvirkanarárin fyri stovnin, sum er ynskiligt

Vit hava tí tørv á serfrøði at standa fyri at skipa hesi viðurskifti á stovninum. Støða er tikin til at brúka Power BI sum grundleggjandi amboð til endamálið, og er tað tí Power BI serfrøði vit leita eftir.

# 1. Inngangur

Gjaldstovan bjóðar við hesum út ráðgeving og menning av eini Power BI-loysn, sum skal verða nýtt til dátugreining, frágreiðingar og leiðslukunning í allari organisatiónini og eisini sum alment kunnandi tilfar til kundar og samfelagið sum heild.

## 1.1 Uppgávan

Uppgávan fevnir um eina heildarveiting frá at greina tørv og ynskir í ymsu pørtunum á stovninum, koma við uppskoti til arkitektur og infrastruktur, seta loysn upp, menna hagtøl, undirvísa starvsfólk og skipan av loysnini (governance) inni á stovninum.

- Kortlegging av dátukeldum, skipanum og verandi rapporteringum
- Greining av tørvi í einstøku deildunum
- Menning av strategi og arkitekturi
- Stovnan av governance-myndli
- Trygd og stýring av rættindum
- Greining av lisenstørvi
- Innføring av Power BI (cloud, on-prem ella hybrid)
- Menning av dashboardum og frágreiðingum
- Skjalfesting av uppsetingini og dátustreymum
- Útbúgving av superbrúkarum og lyklapersónum

Niðanfyri nakrir felagsnevnarar fyri heildarloysnina:

- Felags infrastrukturur og -arkitekturur
- Dátur frá nógvum ymsum dátukeldum
- Nógvar deildir og eindir við ymsum tørvi og útgangsstøði
- Atgongdarstýring og trygd annars er ein týðandi táttur
- Sentral grundloysn, men desentral menning av hagtølum

- Starvsfólk ella aðrir veitarar skulu hava møguleika at menna hagtøl
- Høgt stig av yvirliti
- Ráðgevi(ar) skulu sita fast partar av tíðini á Gjaldstovuni

## 2. Grundarlag

Gjaldstovan er ein almennur stovnur, sum veitir Kt-loysnir til løgting, ráð, stovnar, kommunur, fyritøkur og borgarar.

Gjaldstovuna hevur hesi virkisøki:

- Fyrisiting
- Stovnsroknskapur
- Løn
- Bókhald
- Roknskapur
- Keyp landsins
- Kt Landsins
- Kt-trygd
- Talgildu Føroyar
- Búskaparskipan landsins

Í dag verða brúktar nógvar dátukeldur og amboð. Óneyðugt er at siga, at Gjaldstovan hevur eitt sera stórt og fjølbroytt dátulandslag, sum fevnir um fleiri sløg av dátugrunnum: MySQL, Maria DB, Oracle, Snowflake og MS SQL.

Uppgávan er ymisk frá øki til øki.

Á lønarøkinum, hevur man eitt lønardátuvøruhús, har Power BI verður brúkt sum eitt rapporteringsamboð.

Roknskaparøkið hevur arbeitt við einum roknskapardátuvøruhúsi, sum liggur í Snowflake, har Power BI verður brúkt sum rapporteringsamboð.

Hesi økini skulu luttaka í verkætlanini á einum nógv meira yvirskipaðum stigi, soleiðis, at Lønardátuvøruhúsið og Snowflake, kunnu verða keldur til onnur virkisøki á Gjaldstovuni.

Stýring (Governance) í Power BI

Stýring í Power BI snýr seg um at tryggja eina skipaða og stýrda nýtslu av pallinum, so dátur og frágreiðingar eru álítandi, tryggar og fylgja leiðreglunum hjá stovninum. Ráðgevin skal tí gera ein stýringsmyndil fyri Power BI á Gjaldstovuni. Hetta fevnir millum annað um, men er ikki avmarkað til:

Dátutrygd og atgongdarstýring

Loysnin skal trryggja, at atgongdarstýringin er inntakt, og tú ikki sær dátur í Power BI, sum tú annars ikki eigur at hava atgongd til.

Standardisering og góðskutrygging

Stovnan av felags standardum fyri dátumodellir, navngeving, dokumentatión og rapportdesign fyri at tryggja konsistens og høga góðsku.

Compliance

Loysnirnar skulu lúka galdandi reglur um dátuvernd, rundskriv um KT-trygd og innanhýsis politikkum.

Broytingar (Change Management)

Stýring av menning, test og framleiðslu av rapportum og dashboards, íroknað útgávustýring og broytingarstýring.

Lisensmodell

Lisensmodell er ikki ásett frammanundan. Tað er uppgávan hjá ráðgevanum at greina og lýsa tey ymsu lisensmodellini, útfrá hesum verður støða tikin hvat lisensmodell verður nýtt.

KT Landsins útvega og umsita neyðugu lisensirnar.

Eigaraskapur

Ein av uppgávunum hjá Gjaldstovuni er at skipa ábyrgdina av Power BI, sum skal taka sær av skjalfestingini rundanum Power BI, at syrgja fyri, at felags leiðreglurnar verða fylgdar. Hetta er ikki givið frammanundan.

Vit skulu eisini hava trygdarfunktiónina í Gjaldstovuni inn yvir uppgávuna, sum skal tryggja, at vit yvirhalda trygdina í mun til tær dátuflokkingar, sum dátukeldurnar hava.

## 4. Tilgongd

Vit hugsa verkætlanin í 4 høvuðstættum.

**1) Greiningartáttur**

- Yvirlit yvir dátur, dátukeldur, dátueigarum  og verandi amboð
- Samrøður og verkstovur við deildirnar
- Greining av dátuflowum. Eina meting av views. Somuleiðis verður mett um tørvin at virðisøkja dátur og evt. tørv á einum staging-lagi ella dátuvøruhúsi, so Power BI kann virka so úrslitagott sum gjørligt. Hetta verður eisini partvíst loyst undir punkti 2.

**2) Strategi- og arkitekturtáttur**

- Menning av heildarstrategi fyri Power BI
- Meting av tøkniligum valmøguleikum (cloud, on-prem, hybrid). Hetta er sjálvandi eisini avhangigt av trygdarstiginum av dátunum og prísi fyri loysn.
- Design av arkitektur og integratiónsmeginreglum
- Stýring, leiklutir og ábyrgd. Her er tað týdningarmikið at leggja dent á, at tað her og nú skal verða gjørligt at skapa eitt yvirlit yvir, hvørjar dátukeldur fólk hava atgongd til. Upplýst kann vera, at Gjaldstovan arbeiðir við eini sentralari atgongdarstýring, og tað er ynskiligt, at vit byggja so nógv á hesa sum gjørligt. Tvs. at atgongdir skulu byggjast inn í øll løg og allar súlur av datum.

Í hesum liggur ein støðutakan til, hvussu uppgávan skal organiserast á Gjaldstovuni.

Gjaldstovan, KT Landsins hevur mannagongdir fyri best practices og governance av Power BI fyri Landsnet.

**3) Verksetingartáttur**

- Raðfesting. Farið verður eftir teimum týdningarmestu tingunum á teimum ymsu økjunum, tí er ein beinhørð raðfesting av uppgávunum neyðug, áðrenn farið verður í gongd.
- Uppseting og konfiguratión av Power BI-umhvørvi
- Trygd, rættindi og dátaflutningur
- Menning av dashboardum og frágreiðingum í hvørjari deild
- Í verksetingini verður neyðugt við konkretum DBA og arkitektuppgávum.
- Royndir og góðkenning av loysnini

**4) Yvirtøkutáttur**

- Skjalfesting av Power BI-loysnini, datuflow, dátumyndlum og arbeiðsgongdum
- Undirvísing av brúkarum, sum skulu brúka Power BI til dagligt.
- Útbúgving av superbrúkarum og skjalfesting hvussu umhvørvi tøkniliga verður viðlíkahildið.
- Yvirtøka til rakstur, har mannagongdir fyri viðlíkahald av *views*, tavlum, møguligt staging-lag o.til verður skjalfest og støða verður tikin. Tað skal eisini vera ein roadmap fyri víðari arbeiðið.

## 5. Leiklutir/førleikar

Tað framgongur frá omanfyri, at uppgávan er ikki bara er at duga at gera PBI-rapportir. Uppgávan fevnir um nógv meira.

**Dátuarkitekturur**, modellera, tekna flow, taka støðu til evg.  staging, DWH-komponentar, atgongdarstýringar, samvirkni millum tøknir. Vit hava fleiri sløg av dátugrunnum.

**PowerBI**, at arbeiða saman við brúkaranum, byggja dashboard, gera rapportir etc.

**Dátuserfrøði (DBA)**, gera talvur og views, index, scripta móti dátugrunnunum, optimeringar,

**Greining**. Saman við starvsfólkum greina tørv og taka støðu til røttu loysnina

**Verkætlanarleiðsla.** Standa fyri at leiða tilgongdina saman við starvsfólkum á Gjaldstovuni.

**Bókhald og roknskap**, stórur partur av virkseminum hjá Gjaldstovuni er innan bókhald, roknskap og fíggjarstýring. Tí er tað ein fyrimunur at skilja hesi fakøki.

## 6. Kostnaður og tíðarætlan

Vit síggja fyri okkum at veitarin bjóðar fram við tímaløn, og at veitarin verður okkara BI ráðgevi í sáttmála tíðarskeiðinum. Vit meta leysliga at uppgávan fer at taka eini 500-1000 tímar. Sáttmála tíðarskeiðið er 1 ár, við møguleika fyri at longja upp til 2 ár. Men vit síggja fyri okkum at verkætlanin gjarna skal verða  fyrsta ári ella har um.

Eydnast verkætlanin væl, er møguleiki fyri eini fasu 2, sum kann fevna um í mesta lagi 2 ár og hava á leið sama árliga kostanaðarkarm sum nevnt omanfyri.

## 7. Meting av tilboðum

Metingargrundarlag:

- Góðska 50 %
    - Førleika og royndir hjá ráðgevara toyminum 30%
    - Royndir við líkandi tilgongdum og hvussu veitarin sær fyri sær at hann loysir hesa uppgávuna 20%

    - Tíma prísur 50%

**Góðska**

Hugt verður eftir góðskuni, soleiðis sum lýst í hesum útbjóðingarskrivi.

Tilboðsgevari skal fyrst og fremst lýsa førleikar og royndir hjá ráðgeva/ráðgevum. Haraftrat skal tilboðsgevari koma við sínum boði upp á, hvussu hann ímyndar sær, at loysa uppgávuna, herundir leist, tilgongd og háttalag.

Vit gera vart við, at hetta er okkara kvalitativa meting av góðsku, t.e. hvørja meting Gjaldstovan hevur av innkomna tilfarinum.

Út frá eini samlaðari meting av góðsku verður eitt stigatal á einum skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal

**Prísur**
Tilboðið við lægsta samlaða tímaprísi fær 50 stig. Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli: Tilboð við lægsta tímaprísi/tímaprísur í tilboði, ið skal metast x 50

Lægsti tímaprísurin í frymlinum er 700 kr., t.e. at bjóðar ein veitari lægri enn 700 kr. um tíman, verður tímaprísurin ásettur til 700 kr. í útrokningini.

## 8. Tilboð

Tilboðið skal innihalda:

–Hvussu sær veitarin uppgávuna

– Arbeiðsháttur (t.d. hvussu skulu teir ymsu tættirnir fremjast og hvørjir kunnu koyra parallelt), ætlan og manning.

– Dømi um líknandi uppgávur

– Upplýsingar um tímaprís, og aðrar kostnaðir uttan mvg

## 9. Dómsnevndin

Gjaldstovan setur eina dómsnevnd at meta um innkomnu tilboðini. Í henni sita umboð fyri leiðsluna, starvsfólk sum arbeiða innan øki og Keyp Landsins.

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku/førleikar.

## 10. Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at neyvlýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreytirnar.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing um avgerðina, harundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

## 11. Hentir upplýsingar

Tilboðsgevari hevur møguleikan at fáa fleiri upplýsingar við at seta skriftligar spurningar. Spurningar skulu sendast til birgir@gjaldstovan.fo. Spurningar, ið eru settir fyri fríggjadagin 23. Jan 2026 kl. 13.00, verða svaraðir í seinasta lagi týsdagin 27. Januar 2026 kl. 16.00.

Spurningar verða svaraðir skrivliga. Allir spurningar og svar verða sendir dulnevnd til tey, sum geva tilboð.

Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði

Freist **fríggjamorgunin 06. februar 2026 kl. 12.00**

Tilboð skulu sendast til **keypsportal@gjaldstovan.fo**